# TAÐ HENDIR …

**LAGT TIL RÆTTIS:** Eyðun Klakstein



## BESTA SPÆLIÐ

Ungi arbeiðaradrongurin Francis Quimet er púra burtur í golf og hevur eina sjáldsama golfgávu. Hann droymir um, at hann ein góðan dag skal bjóða heimsins bestu av.

**AUTENTISKUR AMERIKANSKUR FILMUR**
SvF
Sunnukvøldið 22/11 kl. 23.00



## EIVØR Í SPANIASTOVU

Eivør Pálsdóttir, sum júst hevur givið nýggja konsertfløgu út, fer sunnudagin at spæla í Spaniastovu í gomlu handilshúsunum úti í Klaksvík. Eivør hevur spælt víðhvar til størri og smærri tiltøk, men tað er neyvan á hvørjum degi, at Eivør kann upplivast á slíkum søguligum og serligum staði.

**EIVØR**
Spaniastova í Klaksvík
Sunnudagin 22/11 kl. 16.00



## KYSS EIN EINGIL

Hann er maðurin, sum sang ein av kendastu countrysagnum nakrantíð – Kiss An Angel Good Morning – sum føroyingar hava fingið í egnari útgávu við Halli Joensen. Men nú er tað legendariski countrysangarin sjálvur, sum fer at framføra hendan og nógvar aðrar sangir á føroyskum palli.

**CHARLEY PRIDE OG FLEIRI**
Ítróttarhøllin á Hálsi í Havn
Sunnudagin 22/11 kl. 18.00



## SKAPANIN EFTIR HAYDN

Joseph Haydn er tiltikið tónaskald úr Eysturríki og verður onkuntíð nevndur sum faðir symfoniina. Haydn búði stóran part av sínum lívi burtur frá øðrum tónaskøldum, og tað noyddi hann at finna sín egna tónleikastíl. Verkið Skapanin, sum Haydn skrivaði síðst í 1700-talinum, verður framført av Tórshavnar Kamarkóri, Havnarkórinum, Sangarar úr Ebenezerkórinum og Føroya Symfoniorkestri.

**SKAPANIN EFTIR HAYDN**
Norðurlandahúsið
Sunnudagin 22/11
kl. 16.00



## POWERPRINSESSAN

Lone Rasmussen hevur nógv góð ráð til kvinnur um, hvussu tær kunnu fara frá at vera tann pena gentan til at verða ein powerprinsessa við stórum sjálvsáliti og ósmædni. Eisini heldur hon, at frekur dansur kann vera eitt vápn hjá kvinnum, og tað fer Lone Rasmussen at vísa okkurt dømi um, tá ið hon leygarkvøldið vitjar á Hvonn í Havn, haðani Rás2 sendir sendingin Hvonn Live.

**HVONN LIVE**
Rás2 / Leygarkvøldið 21/11 kl. 20.00



## BRANDT TULKAR DYLAN

Sangarin í danska poppbólkinum TV-2 roynir seg nú við fyrstu solofløguni, og á tvífløguni tulkar Steffen Brandt amerikanska tónaskaldið Bob Dylan. Steffan Brandt hevur enduryrkt Dylan, og tað er hann komin væl frá. Á hesari útgávu uppliva vit Steffan Brandt, sum hann sjáldan kann upplivast í TV-2 – sum tann alvorligi yrkjarin og sangari.

**STEFFEN BRANDT**
Baby Blue – Bob Dylan Gendigtet

## NJÓSNARA-SØGUR




Bókin PET snýr seg um donsku loyniløgregluna og hennara arbeiði undir kalda krígnum. Rithøvundarnir greiða frá nøkrum av teimum mest spennandi søgunum hjá PET hesi árini. Søgurnar snúgva seg um eftirlit, njósnarar, víðgongdan politikk og altjóða yvirgang.

**REGIN SCHMIDT, RASMUS MARIAGER OG MORTEN HEIBERG**
PET / Gyldendal



## AFTUR NÁTT Á SAVNINUM

Hevur tú brúk fyri einum filmi til familjuna eitt myrkt vetrarkvøld, so er skemtifilmurin um løgnu og livandi næturnar á fornminnissavninum eitt gott boð. Annar filmurin í røðini *Night At The Museum* er ein stuttligur og undirhaldandi filmur, og hesaferð skal savnsvørðurin Larry, sum verður spældur av Ben Stiller, hava hjálp frá sínum gomlum vinum, tá ið eitt nú Napoleon og Al Capone finna saman fyri at fáa vald á øllum heiminum.

**NÁTT Á SAVNINUM 2**
DVD